*Ónøgdin gav úrslit:*

# Landsverkfrøðingurin í Oljuráðleggingarnevnd

*Løgmaður, sum umsitur oljumál, hevur gjørt av, at landsverkfrøðingsstovnurin skal verða umboðaður í Oljuráðleggingarnevndini*

JAN MÜLLER

„Leingi er tað, ið væl skal verða" og „Betri seint enn ongantíð."

Hesi orðini kann stjórin á landsverkfrøðingsstovninum, Henning Jacobsen í dag av álvara sanna og taka undir við, nú løgmaður hevur sent honum bræv, har sagt verður frá, at hann er valdur at vera limur í Oljuráðleggingarnevndini.



Rúni Joensen, sum nú hevur tikið sæti í Oljuráðleggingarnevndini fyri Súsonnu Danielsen

### Samrøða við Sosialin gjørdi útslagið

Tað eru nakrir mánaðir síðani, at Henning Jacobsen í samrøðu við Tíðindablaðið Sosialin vísti á sína stóru ónøgd við handfaringina hjá landsstýrinum og oljumyndugleikunum í Føroyum av føroyskari luttøku í byrjanarfasuni til eina komandi oljuvinnu.

Henning Jacobsen vísti á, at í hvussu er landsverkfrøðingsstovnurin átti at havt ein natúrligan leiklut í hesum útviklinginum sum luttakari í tí tøkniliga partinum, so gingu landsins myndugleikar við sjálvum landsstýrinum á odda uttan um henda stovn. Hann var serstakliga ónøgdur við gongdina í Loypransverkætlanini og helt tað eisini vera natúrligt, at eitt umboð fyri landsverkfrøðingsstovnin var við í Oljuráðleggingarnevndini. Ein slík umboðan hevði kunnað verið við til at beint fyri misskiljingum, og hevði annars kunnað tryggjað, at tann tøkniligi parturin av øllum oljumálinum eins væl og tann løgfrøðiligi og jarðfrøðiligi eisini var á føroyskum hondum.

Løgmaður var so mikið klokkur av hesi samrøðu við blaðið, at hann kallaði umboð fyri LVF og Oljufyrisitingina til fundar í Tinganesi. Úrslitið varð, at hesir báðir stovnar fingu boð um at tosa saman og finna eina ella aðra loysn á trupulleikunum.

Nú hendir so tað, at løgmaður ger av, at landsverkfrøðingurin Henning Jacobsen skal vera fastur limur í Oljuráðleggingarnevndini.

### Henning Jacobsen fegin um luttøku

Tað hevur ikki eydnast okkum at fáa eina viðmerking frá løgmanni, men Henning Jacobsen sigur við Sosialin, at hann sjálvandi vegna stovnin og annars teknikararnar í Føroyum er fegin um at verða komin í hesa nevndina.

Hann hevur longu verið við á einum fundi og sigur, at limirnir í nevndini hava eina sera stóra og álvarsliga uppgávu at røkja at skula ráðgeva politikarunum í øllum oljumálinum.

Tað er greitt, at við luttøku í nevndini so kunnu vit geva henni teir tankar og ta vitan vit sum stovnur hava og hetta kann so vera við til at mynda tey tilmæli, sum fara víðari.

### Rúni fyri Súsonnu

Umframt at landsverkfrøðingurin er komin í Oljuráðleggingarnevndina, so er eisini tann broyting hend, at Rúni Joensen, hevur tikið sæti í nevndini fyri Súsonnu Danielsen, sum er farin úr Tinganesi. Rúni skal eins og Súsanna umboða landsstýrið og t.v.s. vera høgra hond hjá løgmanni í hesi nevnd.

*Tá landsverkfrøðingurin Henning Jacobsen og annað umboð fyri stovnin vóru boðsend at koma í Tinganes at tosa um innihaldið í samrøðu í Sosialinum. Mynd jan*





*Henning Jacobsen, landsverkfrøðingur heldur tað vera skilagott, at føroyskir teknikarar nú eru umboðaðir í Oljuráðleggingarnevndini*

Sosialurin – fimm ferðir um vikuna við tí feskasta!

Eysturoyar Javnaðarfelag

**Limafundur**

verður á

**Runavíkar Sjómansheimi**

**í kvøld, 10. okt., kl. 20**

Til viðgerðar: Fíggjarlógin, politikkur floksins o.a. Við á fundinum vera Jóannes Eidesgaard, Andreas Petersen og Vilheim Johannesen

**Nevndin**